## Trupult hjá Evra

Patrice Evra, vongverji hjá Manchester United, segði eftir dystin í gjár, at tað var trupult at spæla. – Hetta tí at føroyska liðið spældi so defensivt. Haraftrat tóktist vøllurin at vera rættiliga lítil, men vit fingu tey trý stigini, vit komu eftir og tað er umráðandi. Eins og flestu av hinum leikarunum, hevði Evra hug at hyggja frameftir nú og hann ásannaði, at tað verður trupult í móti Rumenia.



## Nøgdur Domenech

Venjarin hjá franska landsliðnum, Raymond Domenech, var nøgdur við sigurin, hansara menn fingu í gjár. – Vit vinna við einum máli og fáa trý stig, so sjálvandi eru vit nøgdir. Spurdur ítøkiliga til sjálvt spælið hjá sínum liðið, svaraði Domenech, at tað í hansara eygum er sigurin, ið telur. – Sjálvandi høvdu vit verið fegnari, um vit vunnu 5-0, helt Domenech fyri. Hann vísti annars á, at Tórsvøllur ikki var tann besti vøllurin, hann hevði verið á. Eitt nú skuldi grasið var eitt sindur ov langt-



Jákup á Borg fekk bara sjey minuttir á vøllinum, men átti størsta føroyska kjansin
Mynd: Jens Kr. Vang

# Jákup størsta kjansin

**Jákup á Borg kom inn, tá bara fimm minuttir vóru eftir, men kortini eydnaðist honum í yvirtíðini at fáa kanska størsta kjansin, Føroyar høvdu ímóti Fraklandi í gjárkvøldið**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

– Fyrst og fremst mátti eg bara royna at leypa upp og raka bóltin. Eg visti ikki ordiliga, hvagar hann fór, men eg visti, at eg fekk lagt hann rímiliga væl. Tíverri fór hann beint við síðuna av.

Tað segði Jákup á Borg, sum fekk tilsamans sjey minuttir á vøllinum, men í yvirtíðini fekk kanska størsta kjansin, tá hann royndi at seta krúllin undir bóltin við fremru stong, eftir at Jónas Þór Næs hevði tveitt langt innkast í vinstru síðu.

– At skalla hevur ongantíð verið mín sterka síða, viðgekk Jákup, sum fekk skallað bóltin, men var so mikið kroystur av tveimum fraklendingum, at bólturin fór minna partin av einum hálvum metri fram við málinum.

29 ára gamli miðvallarspælarin hevur nú verið við fýra av teimum fimm ferðunum, Føroyar hava møtt Fraklandi, og hann heldur tað vera líka stórt hvørja ferð.

– Enn eina ferð var tað ein risastór uppliving, tí hetta eru alt stórar stjørnur. Men tað er eitt sindur keðiligt, at vit ikki hava skorað ímóti teimum enn. Hinvegin kundu vit kortini fegnast um, at áskoðararnir vóru so væl við og stuðlaðu okkum so væl, segði hann.

### Gott avrik

Hóast stuttu løtuna á vøllinum, spældi hann í gjárkvøldið sín landsdyst nummar 58, og av núverandi spælarum er tað bara Jákup Mikkelsen, sum við sínum 63 landsdystum hevur fleiri í ummælisbókini.

– Hesa ferð var eg so stutt inni, at mín innsatsur nokk ikki kann metast rættiliga. Men liðið vísti eitt gott avrik, og serliga frísporkini hjá Súna Olsen vóru fantastiska góð, staðfesti Jákup á Borg, ið helt fraklendingar gera alt fyri at fáa eitt mál aftrat, tí teir ikki vóru heilt álvuligir við bara at vera á odda 1-0.

– Vit vistu, at teir ikki ætlaðu at seta Ribery inn, uttan so at teir kendu seg noyddar til tað, og tað gjørdu teir so. Men sum heild haldi eg, at franska liðið var akkurát so gott, sum tað hevur verið.

## HM-undankapping, bólkur 7

**Spældir dystir**

| | | |
|---|---|---|
| 06/09-2008 | Serbia-Føroyar | 2-0 (1-0) |
| 06/09-2008 | Eysturríki-Frakland | 3-1 (2-0) |
| 06/09-2008 | Rumenia-Litava | 0-3 (0-1) |
| 10/09-2008 | Føroyar-Rumenia | 0-1 (0-0) |
| 10/09-2008 | Litava-Eysturríki | 2-0 (0-0) |
| 10/09-2008 | Frakland-Serbia | 2-1 (0-0) |
| 11/10-2008 | Føroyar-Eysturríki | 1-1 (0-0) |
| 11/10-2008 | Serbia-Litava | 3-0 (2-0) |
| 11/10-2008 | Rumenia-Frakland | 2-2 (2-1) |
| 15/10-2008 | Litava-Føroyar | 1-0 (1-0) |
| 15/10-2008 | Eysturríki-Serbia | 1-3 (0-3) |
| 28/03-2009 | Rumenia-Serbia | 2-3 (0-2) |
| 28/03-2009 | Litava-Frakland | 0-1 (0-0) |
| 01/04-2009 | Eysturríki-Rumenia | 2-1 (2-1) |
| 01/04-2009 | Frakland-Litava | 1-0 (0-0) |
| 06/06-2009 | Serbia-Eysturríki | 1-0 (1-0) |
| 06/06-2009 | Litava-Rumenia | 0-1 (0-1) |
| 10/06-2009 | Føroyar-Serbia | 0-2 (0-1) |
| 12/08-2009 | Føroyar-Frakland | 0-1 (0-1) |

**Støðan**

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Serbia | 7 | 6-0-1 | 15- 5 | 18 |
| Frakland | 6 | 4-1-1 | 8- 6 | 13 |
| Litava | 7 | 3-0-4 | 6- 6 | 9 |
| Eysturríki | 6 | 2-1-3 | 7- 9 | 7 |
| Rumenia | 6 | 2-1-3 | 7-10 | 7 |
| Føroyar | 6 | 0-1-5 | 1- 8 | 1 |

**Komandi dystir**

| | |
|---|---|
| 05/09-2009 | Eysturríki-Føroyar |
| 05/09-2009 | Frakland-Rumenia |
| 09/09-2009 | Føroyar-Litava |
| 09/09-2009 | Rumenia-Eysturríki |
| 09/09-2009 | Serbia-Frakland |
| 10/10-2009 | Eysturríki-Litava |
| 10/10-2009 | Frakland-Føroyar |
| 10/10-2009 | Serbia-Rumenia |
| 14/10-2009 | Litava-Serbia |
| 14/10-2009 | Rumenia-Føroyar |
| 14/10-2009 | Frakland-Eysturríki |

## Jónas fekk troyggjuna frá Ribery

**– Tað er altíð fantastiskt at spæla fyri landsliðið, við tjóðsanginum og øllum tí heila, sigur Jónas Þór Næs, sum eftir dystin skundaði sær at fáa troyggjuna frá Ribery**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Serliga í fyrra hálvleiki hevði Jónas Þór Næs úr at gera á høgra bakki, har hann ferð eftir ferð fekk tveir fraklendingar at stríðast við í senn. Trupulleikin gjørdist ikki so stórur eftir steðgin, men síðstu 25 minuttirnar spældi Jónas beinleiðis yvir fyri Franck Ribery, ið kom inn sum seinasta royndin hjá Fraklandi at vinna við meiri enn einum máli.

– At spæla yvir fyri Ribery, er sjálvandi ein stór uppliving, men eg hugsaði ikki um tað, meðan dysturin var. Tað var sum at spæla ímóti einum og hvørjum øðrum, men hann er heilt øgiliga góður. Tá dysturin var av, var eg øgiliga troyttur, men eg vil siga, at eg eri nøgdur við at tapa 1-0, segði Jónas Þór Næs, sum eftir dystin skundaði sær at fáa blusuna frá Ribery.

– Sjálvandi er tað nakað serligt at spæla ímóti Fraklandi við øllum stjørnunum, men eg vil siga, at sum heild er tað nakað serligt at spæla fyri Føroyar. Tað er fantastiskt at spæla fyri landsliðið, við tjóðsanginum og øllum tí heila.



Jónas Þór Næs taldist millum bestu føroysku leikararnar
Mynd: Jens Kr. Vang